HEILSUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS

# Skrivari til Kommunulæknaskipanina og Heilsumálaráðið

Eitt fulltíðarstarv fyri skrivari í barnsburðarfarloyvi til umsiting av Kommunulæknaskipanini er leyst at søkja til setan 1. juni 2011 ella skjótast til ber.

**Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum**
- Avgreiða setanir til kommunulæknavloysarar og setanir í kommunulæknaskipanini, herundir eisini samskifti við kommunur og aðrar samstarvsfelagar
- Lønaravgreiðsla, herundir eisini skráseting av útgjøldum
- Vanligt skrivstovuarbeiði/máls-fyrireiking
- At skipa fyri fundum
- Vera skrivari hjá nevndum/arbeiðsbólkum

Tann, ið settur verður skal kunna tola broytingar í arbeiðinum og eisini kunna arbeiða uttan fyri Kommunulæknaskipanina - innan fyri økið hjá Heilsumálaráðnum.

**Vit hugsa okkum at tú hevur**
- Skrivstovuútbúgving
- Góðan kunnleika til KT og journalskipanir
- Kunnleika til almenna fyrisiting
- Góðan málsligan førleika í føroyskum, donskum og enskum
- Góð samstarvs- og samskipanarevni
- Evni at arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða**
Eitt fjølbroytt og spennandi starv, til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
Setanarøkið fevnir um Heilsumálaráðið og stovnar undir tí.

**Nærri upplýsing**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Margit Stórá, fulltrúa, tel. 30 40 52, ella teldupost margit.stora@hmr.fo

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til: hmr@hmr.fo ella Heilsumálaráðið, Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn

**Freist**
Freistin at søkja er 18. mai 2011, kl. 12.00

Sosialurin 341800

Eirargarður 2 · 100 Tórshavn · tel 30 40 50 · fax 35 40 45 · hmr@hmr.fo · www.hmr.fo

MTHøjgaard
We know how

J&K PETERSEN

EIÐI 2 Suður KONSORTIET

## Hevur tú hug at verða við til at gera tunnil við tí einastu tunnilsborimaskinuni í Føroyum?



So er møguleikin her, tí vit hava brúk fyri **arbeiðsfolki** og **elektrikara** til okkara borihold.

Eiði 2 Suður konsortiet er í gongd við at bora 8,5 km tunnil í.s.v. vatnorkuútbyggingina hjá SEV. Tað verður borað í 3-hold skiftum, við einum holdi á frívakt. Løn sambært sáttmála + boribonus.

EIÐI 2 Suður KONSORTIET

Torben Johansen
Tel: 216340
@: tjo@mth.dk

# Sosialurin
# Sosialurin i

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

# Roynt skrivstovufólk til Sjóvinnustýrið

**Av tí, at ein av okkara starvsfeløgum í Sjóvinnustýrinum fer frá fyri aldur, er eitt starv sum skrivstovufólk í umsitingini leyst at søkja.**

**Starvið fevnir í høvuðsheitum um:**
- Journalisering
- Arkivering
- Telefon- og kundaavgreiðsla
- Bókhald
- Aðrar fyrifallandi skrivstovu uppgávur

**Útbúgvingar- og førleikakrøv:**
Skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Harumframt krevst:**
- Hollan kunnleika til journal/arkiv
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góð samstarvsevni
- Evni at arbeiða sjálvstøðugt
- Jaligan hugburð
- Góðan telduførleika
- Kunnleika til journalskipanna 360 og Doculive er ein fyrimunur

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er Sjóvinnustýrið í Miðvági.
Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Vinnumálaráðnum.
Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi starvsøki á stovni í støðugari menning við fjølbroyttum uppgávum at loysa bæði í Føroyum og úti í heimi.
Stovnurin leggur dent á at bjóða starvsfólkum sínum holla og støðuga eftirútbúgving við møguleikum at menna seg fakliga og persónligt.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Sjóvinnustýrinum í hendi í seinasta lagi 16. mai kl. 15.00.

Fyrispurningar um starvið kunnu setast til Vilhjálm Gregoriussen ella Christel Christoffersen.

**Umsóknir skulu sendast sum bræv ella teldubræv til:**
SJÓVINNUSTÝRIÐ, POSTSMOGA 26, FO-370 MIÐVÁGUR ELLA FMA@FMA.FO

*Sjóvinnustýrið er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum. Ábyrgdarøkið hjá stovninum hevur útgangsstøði í sjóvinnuni og rammunum fyri hesi vinnu. Hetta fevnir um sjóvinnupolitikk og lóggávu, eftirlit við bygging av føroyskum skipum og hvussu hesi eru gjørd út, áseting um manning, at tryggja arbeiðsumhvørvið umborð á skipum, umhvørvisvernd og skráseting í Føroya Skipaskrá og Føroya Altjóða Skipaskrá. Høvuðsendamálið hjá Sjóvinnustýrinum er at fyribyrgja óhapp og tryggja høgt trygdarstøði fyri før undir føroyskum flaggi og manning teirra. Harumframt miðar Sjóvinnustýrið ímóti, framhaldandi at menna kappingarførið hjá FAS.*